# Miðvís venjing er vegurin fram

*Dreymur hansara er at gerast yrkisleikari í einum av stóru fótbóltsfeløgunum úti í heimi. Hann hevur, hóast sín unga aldur, longu veri› til fyrstu venjingarnar vi› 1. deildarli›num hjá B36. Og hóast Argjama›ur ásannar hann, at hann er B36´ari um ein háls. Yngd hevur hitt 18 ára gamla studentarskúlanæmingin og fótbóltsleikaran, Ragnar Poulsen*



Myndir: Jens Kristian Vang

*“Ег eri til rei›ar at gera nógv fyri at náa teimum málum eg havi sett mær fyri.”*

**Jákup Bogi Joensen**

At ganga í studentarskúlanum í Hoydølum, umframt at spæla fótbólt á høgum stø›i, er strævi›. Hetta ásanna›i 18 ára gamli Argjama›urin, Ragnar Poulsen, tá Yngd hitti hann uppi í Hoydølum fríggjadagin í farnu viku.

Ragnar Poulsen hevur, sum so mangur annar ungur fótbóltsleikari, ein dreym um at gerast yrkisleikari í einum av stóru feløgunum úti í heimi. Men hann er grei›ur yvir, at hetta krevur hart arbei›i. Hann er tó til rei›ar at gera nógv fyri at náa teimum málum, hann hevur sett sær fyri innan fótbóltin.

Nøkur av teimum málum hann hevur sett sær fyri at náa í ár, eru milum onnur, at koma á U-18 landsli›i›, og so hevur hann ein stóran dreym um, at í ár skal hann spæla sínar fyrstu dystir á 1. deildarli›num hjá B36.

Og hóast hann er Argjama›ur, so ásannar hann, at hann er B36´ari um ein háls.

## Byrja›i sum fimm ára gamal

Ragnar hevur altí› havt áhuga› fyri fótbólti og dámt væl at spælt fótbólt.

Men nær byrja›i hann at gera álvara av fótbóltinum?

-Mær hevur altí› dámt væl at spælt fótbólt, og havi spælt alt ta› eg kann minnast.

Eg minnist væl, at eg plagdi at spæla fótbólt saman vi› nøkrum av vinmonnum mínum úti á Argjum. Eg gjørdist so hugtikin av spælinum, at eg gjørdi av, at fara at royna meg í einum veruligum fótbóltsfelag. Tá havi eg veri› okkurt um fimm ára gamal. At ta› gjørdist B36 var kanska meira av tilvild enn naka› anna›.

Ragnar Poulsen hevur veri› heppin, tá hugsa› ver›ur um, at hann júst um hetta mundi valdi at fara í B36. Hann gjørdist nevnliga partur av einum ótrúliga gó›um li›i, sum ongin stó› kurl í nógv ár. Longu fyrsta ári› - ta› var í hinum minniliga fótbóltsárinum 1990 - vann hann, saman vi› li›feløgum sínum, sítt allar fyrsta føroyameistaraheiti›.

Hóast hetta var í smápiltadeildini, so heldur Ragnar, at hetta til tann dag í dag, er hansara størsta uppliving innan fótbóltin.

- Eg havi so heilt avgjørt havt nógvar stak gó›ar løtur vi› fótbóltinum, men ta› er ongin hending sum stendur so sterk í minninum, sum júst handan, tá eg gjørdist føroyameistari á fyrsta sinni, heldur Ragnar fyri.

Men ta› skuldi vísa seg, at hetta gjørdist ikki seinasta meistaraheiti› hjá Ragnari. Nei, teir vóru nærum einará›andi upp ígjøgnum allar ungdómsdeildirnar og hava vunni› ta›, i› vinnast kann. So einfalt kann ta› í veruleikanum sigast.

Seinnu árini hava grannarnir úr HB tó veri› stóri sigursharrin í ungdómsdeildunum. Hetta heldur Ragnar ikki vera so undarligt.

- Onki li› var so gott sum okkara, sta›festir Ragnar, og flennur so ta› hoyrist út um allar geilar.



Myndir: Jens Kristian Vang

## Frá Pondus Cup á Villa Park í Birmingham

Ragnar Poulsen sigur vi› Yngd, at hann hevur fingi› nógv sera gó› og positiv upplivilsir vi› fótbóltinum.

Men serliga væl minnist hann uttanlandstúrarnar. Í 1997 var hann vi› á B36 li›num, sum hetta ári› tók lut í stóru fótbóltskappingum í Danmark.

- Vit vóru til tvær kappingar. Limfjords Cup nevndist stór kapping í Lemvig, og sí›ani vóru vit til sonevndu Solsidens Pondus Cup uppi í Nørresundby beint uttan fyri Aalborg.

Ári eftir, í 1998, vóru vit aftur í Limfjords Cup og sí›ani vóru vit til eina kapping uppi í Skagen.

Men hevur tú lært naka› av hesum túrum?

- So heilt avgjørt. Mótstø›an var væl sterkari, enn hon vit vóru vanir vi›. Bara ta› í sær sjálvum gevur eina rúgvu. Og at sleppa at royna seg á grasi er eisini stuttligt og eitt upplivilsi í sær sjálvum. Vit spæla jú ikki á grasi í Føroyum, tíverri.

Ragnar Poulsen leggur annars sera stóran dent á, at slíkir túrar eru mest fyri at fáa nøkur gó› upplivilsi og fyri samanhaldi› á li›num.

Men Ragnar Poulsen hevur veri› a›rar og kanska betri túrar enn vi› B36. Í 1998 var› skipa› fyri stórari fótbóltsfer› til Birmingham í Onglandi. Møguleiki var hjá ungum føroyskum fótbóltsleikarum at fara á fótbóltsskúla í eina viku.

Ragnar gjørdi av at fara, og hetta minnist hann sum ein frálíkan túr.

Á túrinum var vant rættiliga nógv - tvær fer›ir um dagin - umframt at einir tríggir dystir vóru leiktir.

Ta› sum var mest forkunnugt á túrinum mundi vera eigarin av skúlanum. Jimmy Brown eitur hann og spældi mi›skei›is í sjeyti árinum á besta li›num hjá Aston Villa, og á skotska landsli›num, grei›ir Ragnar frá.

Jimmy Brown var einas 17 ára gamal, tá hann gjørdist li›for›ma›ur á Aston Villa li›num. Annar kendur ma›ur var eisini á skúlanum. Kanska ikki so kendur her í Føroyum, men í Onglandi. Brian Caswell eitur hann, og hann var venjari á fótbóltsskúlanum. Brian hevur millum anna› veri› vi› til at vinna enska meistaraheiti› vi› Leeds United.

Størsta upplivingin á túrinum mundi uttan iva vera útfer›in til Villa Park í Birmingham. Heimavøllurin hjá stórfelagnum Aston Villa.

- Villa Park var eitt sera flott og væl hildi stadion, ongin ivi um ta›, sta›festir Ragnar.

## Hevur sett sær stór mál

Ragnar Poulsen hevur, hóast síni fantastisku evnir, ongantí› veri› á nøkrum landsli›i. U-Landsli›i væl at merkja. Hetta er kanska undrunarvert, tí spyrt tú mótstø›uleikaran, so er hann ikki í iva. Ragnar er ein ótrúliga gó›ur fótbóltsleikari. Hansara sterkastu sí›ur liggja í tí tekniska partinum av spælinum, og so er hann ein ótrúligur kempari. Hann hevur ein ótrúliga sterkan vilja.

Ragnar er tó ikki so keddur av, at hann ikki hevur veri› á nøkrum landsli›i.

- Eg var til venjingar einafer›, men bleiv ikki úttikin. Sólei›is er ta›, men nú havi eg gjørt av at hyggja fram í tí›ina. Vegurin er hør› og mi›vís venjing.

Og Ragnar er til rei›ar at gera nógv fyri at náa teimum málum hann hevur sett sær fyri.

So nógv, at hann herfyri takka›i pent nei til U-18 landsli›i› í hondbólti, har hann eisini var úttikin til venjingar.

- Eg havi sett mær sum mál, at koma á U-18 landsli›i› í fótbólti, og so havi eg ein dreym um, at ta› fer at eydnast mær at koma á 1. deildarli›i› hjá B36.

Alt anna› má víkja. Eisini hondbólturin, grei›ir Ragnar frá.

Men ta› er kanska naka› sum bendir á, at ta› fer at eydnast Ragnari at røkka nøkrum av sínum málum í ár. Hann hevur longu nú veri› til sínar fyrstu venjingar saman vi› 1. deildarli›num hjá B36.

Men hann ásannar, at ta› er ikki bara sum at siga ta›.

- Vit venja hvønn dag í vikuni undantiki› leygardag. Og tá tú venur vi› í 1. deildarhópinum er ongin gó›a mamma. Ta› er hart og kontant spæl, men ta› má eg bara venja meg vi›, sigur Ragnar.

Størsti dreymurin hjá Ragnari er tó at gerast yrkisleikari í einum av stóru feløgunum úti í heimi. Hann er tó grei›ir yvir, at einasti vegurin fram móti málinum er hart og mi›víst arbei›i.

Vit á Yngd takka Ragnari fyri práti› og fara at ynskja honum alt ta› besta framyvir.



Myndir: Jens Kristian Vang